# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# Stjóraskifti á Adventistaskúlanum

**Adventistaskúlin fær nýggjan stjóra 1. august, tá Andrea á Rípuni tekur við eftir Janne Schantz Johnsson, sum hevur verið skúlastjóri seinastu 25 árini**

Eftir at hava verið stjóri á Adventistaskúlanum við Hoyvíksvegin í Havn síðan 1985 gevst Janne Schantz Johnsson sum skúlastjóri í summar, og Andrea á Rípuni tekur við, tá skúlaárið byrjar aftur í august.

Andrea á Rípuni er 35 ára gomul, ættað úr Klaksvík og búsitandi í Kvívík. Hon tók sína læraraútbúgving á Føroya Læraraskúla í 2001 og arbeiddi sum fólkaskúlalærari á Argjum og í Vestmanna, áðrenn hon fekk starv á Adventiskaskúlanum í januar 2009.

Janne Schantz Johnsson er donsk. Hon tók lærarapróvg á Jelling Statsseminarium í 1972 og arbeiddi sum lærari á Vejlefjordskolen, sum er ein skúli við næmingum frá 1. flokki til 3.g. Har arbeiddi hon í 13 ár, til hon flutti til Føroyar og tók við sum skúlastjóri á Adventistaskúlanum tann 1. august 1985.

Janne sigur, at hon hevur havt 25 spennandi ár á Adventistaskúlanum við stórum avbjóðingum.



*Andrea á Rípuni (v.m.) tekur við eftir Janne Johnsson, sum hevur verið skúlastjóri á Adventistaskúlanum seinastu 25 árini*

Hevði hon ikki havt sínar hollu royndir frá Vejlefjordskolen, hevði hon helst ikki hildið á í starvinum so leingi. Síðan frískúlalógin kom í gildi í 2003, hevur tað tó verið munandi lættari at rikið skúlan, serliga fíggjarliga.

Maður Janne, Kristinn Johnsson, sum eisini var lærari á skúlanum, stuðlaði henni sera væl frá byrjan, til hann andaðist fyri tveimum árum síðan. Janne sigur, at hon hevur fingið góðan stuðul frá lærararunum, sum eru sannir idealistar á sínum øki. Eisini hevur skúlastýrið stuðlað henni væl. Samstarvið við foreldrini, og álitið tey hava víst okkum á skúlanum, hevur eisini verið sera gott.

Janne sigur, at tey t.d. øll árini hava lagt seg eftir, at næmingarnir eru í skúlanum, frá tí at teir koma, til tey fara heim aftur. Soleiðis at skilja at um ein lærari er sjúkur, verður altíð ein vikarur settur inn sum avloysari, so næmingarnir ikki ganga í býnum í skúlatíðini. Meginreglan hjá skúlan er, et tíðin hjá næmingunum er eins kostbar og tann hjá lærarunum.

Adventistaskúlin hevur hildið til við Hoyvíksvegin síðan 1966, tá hann var tikin í nýtslu av fyrstan tíð sum ein kristin skúli við tí grundleggjandi áskoðan, at barnið eigur at mennast bæði andaliga, likamliga og kunnskaparliga. Talan er um eitt alternativt tilboð til næmingar og foreldur.

Skúlin var upprunaliga privatskúli, men síðan 1. august 2003, tá frískúlalógin kom í gildi í Føroyum, hevur hann verið rikin sum frískúli.

### Prógv

Ata Maria Bærentsen hevur lokið prógv sum cand. jur. frá Københavns Universitet.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 11. mai hava Irena og Ronald Olsen á Nesi silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 15. mai í Missiónshúsinum Tabor á Toftum frá kl. 10 til 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.



*Týsdagin 25. mai hava Turid og Sofus Joensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Oasuni, Kirkjustræti 2, Hoyvík, tann 29. mai frá kl. 11 til 17. Øll ið vilja gleðast saman við okkum eru vælkomin.*

# Jakku í Heimistovu deyður

Leygarkvøldið andaðist Jacob Vilhelm Hansen, vanliga nevndur Jakku í Heimistovu, á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, 103 ára gamal.

Jakku var ættaður av Glyvrum. Hann var sjómaður øll síni bestu ár og var við fleiri ymiskum skipum. Eitt nú var hann í fleiri ár við Cementu hjá Óli á Miðgerði í Fuglafirði. Hann var eisini onkran túr við fiski í Bretlandi undir krígnum.

Tað mundi vera undantakið tá í tíðini, at fólk høvdu fleiri útbúgvingar, men Jakku var bæði maskinmeistaralærdur og hevði skiparaútbúgving.

Eftir at hava siglt í mong ár, legðist Jakku upp á land. Hann hevði sera gott handalag og arbeiddi á snikkaraverkstaðnum á Glyvrum í nøkur ár, til hann sjálvur fór at smíða hús. Hann bygdi nógv sethús til fólk, ið standa sum ein varði yvir tann partin av arbeiðslívinum hjá honum.



*Jakku saman við langabbadóttrini Sonju*

Kona Jakku, Elina, var ættað úr Kvívík. Hon andaðist í 1993, 77 ára gomul. Saman fingu tey sjey børn.

Jakku búði á Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi seinastu 7 árini. Hóast høga aldurin hevur hann verið væl fyri, hann bæði hoyrdi og sá væl. Hann hevur verið uppi hvønn dag til tað seinasta.

Jakku fer til gravar úr Glyvra kirkju mikudagin kl. 14.

-red

ANDLÁT

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra mamma, omma og vermamma okkara

**Tóra Spangenfeldt,**
fødd Skála,

andaðist í heiminum 4. mai 89 ára gomul.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mánadagin 10. mai kl. 18.00 og jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 11. mai kl. 14.00.

***Vegna tey avvarðandi***
***Finn og Jógvan Spangenfeldt***